# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Altjóða bankakreppan ber tískil eisini við her hjá okkum, eitt nú tí, at partar av vinnuni verða fíggjaðir av útlendskum bankum. Landsins myndugleikar eiga tí at fylgja væl við gongdini og eiga javnan at kunna almenningin um, hvørjar ætlanir teir hava til tess at byrgja fyri kreppu her hjá okkum*

*oddagreinin*

## Bankakreppan

Forsetin í USA George W. Bush, ið er neokonservativur og sum slíkur heitur talsmaður fyri púra ótálmaðum marknaðarbúskapi, noyddist herfyri blankt at viðganga, at tað er heilt galið við amerikanska búskapinum. Í røðu til amerikansku tjóðina fyri viku síðani gjørdi forsetin greitt, at allur búskapurin stendur til at rapa. Hann segði samstundis, at fer hetta at henda, fara milliónir av amerikanarum í vinnuloysi. Stjórnin og samveldisbankin løgdu tí fram eina bjargingarætlan, ein hjálparpakka, tann sonevnda bail out ætlanin, sum í stuttum merkti, at amerikanska fíggjarmálaráðið skuldi fáa heimild at taka yvir vánalig lán fyri at bjarga bankasektorinum.

Uppskotið fekk rættiliga góða móttøku í kongressini, har leiðslurnar í báðum flokkum um vikuskiftið samdust um at samtykkja uppskotið við nøkrum broytingum. Hesar broytingar ásettu nærri treytir fyri hjálparpakkanum. Men í gjárkvøldið hendi so tað, sum eingin hevði væntað: ein meiriluti í Umboðsmannatinginum feldi uppskotið. Lagnan hjá hesum uppskoti er nú óviss, hóast flokksleiðskurnar í morgun boðaðu frá, at roynt verður enn einaferð at fáa eitt líknandi uppskot samtykt. Arbeitt verður við broytingum, ið skulu tryggja uppskotinum eina betri lagnu.

Tá tað frættist, at hjálparpakkin var fallin í Umboðsmannatinginum, fullu partabrævakursirnir um allan heimin. Hetta hendi samstundis, sum uppaftur fleiri bankar eru komnir í álvarsamar trupulleikar. Bankakreppan ger um seg í flestu framkomnu londum, eitt nú Japan, Fraklandi, Belgia, Bretlandi og í Íslandi, har landið í gjár yvirtók stóran banka. Kreppan í USA byrjaði í bankakervunum, og orsøkirnar til hesar trupulleikar eru fleiri. Flestu eygleiðarar halda meginorsøkirnar vera ein ábyrgdarleysur útlánspolitikkur, spekulatión og bygnaðarligir trupulleikar í amerikanska búskapinum. Afturat hesum koma høgu oljuprísirnir og flyting av stórum pørtum av ídnaðinum til lágløntarlond. Ein fylgjan av øllum hesum er trótandi gjaldføri og rentuhækkingar, sum so aftur hava sligið beinini undan húsaánarum og privatu nýtsluni.

Bankakreppan ger eisini um seg um okkara leiðir. Í Danmark eru fleiri smærri bankar í trupulleikum, og stjórnin og tjóðbankin hava boðað frá, at allir bankar fáa hjálp, treytað av, at teir bankar, sum eru í trupulleikum leggja saman við stórbankar ella verða seldir. Føroyar eru vorðin partur av altjóða samfelagnum og tí merkja vit allar broytingar, sum henda úti í heimi. Altjóða bankakreppan ber tískil eisini við her hjá okkum, eitt nú tí, at partar av vinnuni verða fíggjaðir av útlendskum bankum. Landsins myndugleikar eiga tí at fylgja væl við gongdini og eiga javnan at kunna almenningin um, hvørjar ætlanir teir hava til tess at byrgja fyri kreppu her hjá okkum.

**Sosialurin**

# Fakligt virksemi treytaleyst

**TÓRA VIÐ KELDU**



"Ongin minnist longur skúlan, sum tók fulla ábyrgd fyri at útbúgva næmingar á greiðum og avmarkaðum fakligum økjum", sigur Ulla Nørtoft Thomsen cand. mag. og seminarieadjunkt í áhugaverdari klummu inni á 180grader.

**Skúlin inn í óviðkomandi áhugamál**
Hóast Ulla Nørtoft Thomsen í klummuni "Hyggeskolen" skrivar um danska fólkaskúlan, eru fleiri drøg at kenna aftur í føroyska fólkaskúlanum. Hon skrivar m.a., at í dag skal skúlin inn og hava meining um og viðgera øll privat viðurskifti hjá næmingunum. Fólkaskúlalógin, sum áður hevði verið greið tala, har uppgávan hjá skúlanum var faklig, sigur nú, at næmingarnir skulu hava "møguleika" fyri at læra nakað. Ongin minnist longur skúlan, sum tók fulla ábyrgd fyri at útbúgva næmingar á greiðum og avmarkaðum fakligum økjum. Dagsins foreldur hava sjálvi verið í hesi skipan, og tí krevja tey bara, at skúlin skal inn í viðurskifti, sum ikki átti at havt skúlans áhuga, og sum avleiðing ikki tekur veruliga endamál skúlans í álvara.

**Sosialt skúlaverk**
Hugsast kann, at eisini føroyski fólkaskúlin seinastu fleiri árini er gliðin út á eitt síðuspor, sum hevur ført alla skipanina av leið. Eingin ivi er um, at føroyski fólkaskúlin er ein dýrgripur fyri samfelagið. Her liggur veruligt potentiali, bæði í lærarum og næmingum, sum tó ikki verður nýtt til fulnar.

Ein stórur, væl dokumenteraður trupulleiki er, at lærarar, sum hava ambitiónir og fakliga gleði at undirvísa, verða alt ov ofta avbrotnir og settir til uppgávur, teir ikki hava hug til ella eru útbúnir til. Hetta krevur nógva tíð og óneyðuga nógv fundarvirksemi. Tað tykist sum um, at skúlin gerst meir og meir eitt sosialt skúlaverk, enn eitt spennandi fakligt kraftsentur.

**Neyðugt við broytingum**
Væl vitandi um stóra munin á finska og føroyska samfelagnum, havi eg hug aftur at nevna áðurnevndu klummu, sum eisini kemur inn á PISA og finska skúlaverkið. Nøkur punkt, sum finski skúlin m.a.raðfestur høgt er:

- differentiera greitt og avgjørt
- hava eina greiða dagsskrá
- avmarkað og skipað samskifti millum heim og skúla
- færri fundir - bæði við leiðslu, lærarar og foreldur
- strukturerað undirvísing, sum sjálvdan verður avbrotin
- høg krøv til lærarútbúgvingina
- leggja størri dent á einstøku lærugreinina enn tvørfakligheit og lærarautoymi

Í skúlaverkinum eyðkennir tað bæði næmingar, foreldur og lærarar, at tey virðismeta fakliga vitan, sum týdningarmesta endamál og eisini skyldu skúlans.

**Trivnaður og fakligheit**
Í dag er trivnaður settur á dagsskránna í føroyska fólkaskúlanum og er sjálvandi tvingandi neyðugur, um næmingarnir skulu verða førir fyri at mennast. Tó síggi eg vanda í, at krøvini til trivnaðin ikki verða flættað saman við góðum fakligum støði og umhvørvi.

Trupulleikin er kanska, at trivnaður og fakligheit ofta verða sett upp ímóti hvørjum øðrum. Havi onkuntíð hug at halda, at skúlin heldur velur trivnað millum næmingar, enn fakliga sterkar næmingar. Tó nýtist hetta als ikki at vera antin ella.

Tað er ongin grund at halda, at næmingar fara at trívast verri um fakliga ferðin verður økt. Tað er heldur ongin grund at halda, at gjógvin millum veiku og sterku næmingarnar verður djúpri. Eg eri vís í, at allir næmingar verða lyftir upp á hægri støði bæði fakliga og sosialt. Ulla Nørtoft Thomsen vísir eisini á, at í finska skúlanum, har fakliga ferðin er høg, trívast næmingar betur enn eitt nú danskir næmingar.

Tað er ongantíð rætt bara blint at taka til sín tað, sum onnur gera. Tó kunnu vit erliga siga, at tað í løtuni er ov ógreitt, hvat endamálið við føroyska fólkaskúlanum er, og hvat hann stendur fyri. Áðrenn vit gera okkum hetta greitt, koma vit ikki til týdningarmesta kravið til skúlan, sum er at hava fakliga stoltar lærarar, sum veruliga trívast í starvinum.

*www.myspace.com/toravidkeldu*
*hjarta@kallnet.fo*

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.